Kommunufelagið

Umhvørvismálaráðið

Dagfesting
20. oktober 2025

Okkara j.nr.
25/09549-2

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
23/01930

Ummæli av uppskoti til veðurlagslóg

Hin 19. september 2025 sendi Umhvørvismálaráðið uppskot til løgtingslóg um veðurlagslóg til ummælis.

Viðvíkjandi ætlaða Veðurlagsráðnum vísir Kommunufelagið á, at sambært uppskotinum verða allir limirnir tilnevndir av landsstýrisfólkinum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum. Kommunurnar fáa ikki høvi at velja eitt umboð.

Felagið minnir á, at kommunurnar standa fyri heilt munandi parti av almenna búskapinum, eru staðbundni umhvørvismyndugleikin og í verki hava avgerandi leiklutir í veðurlagsátøkum av øllum handa slagi.

Tað er tí rímiligt og fakliga skilagott, at eitt av teimum trimum umboðunum í Veðurlagsráðnum verður tilnevnt av kommununum.

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri